# Ein egnari í mótljósi

Eg fari at heita á alt Føroya fólk um at fara til Klaksvíkar, tá ið tunnilin letur upp, at hyggja at tí fjálga egnarinum hjá Archibald. Hetta er eitt frábera gott, fjálgt listaverk. Øll Klaksvíkin er í hesari standmynd, sum verd er at skoða, hugleiðir Frits Johannesen



*Egnarin hjá Archibald í Klaksvík*

**EGNARIN**
*Frits Johannesen*

Fyri stuttum hevði Sjónvarpið sending frá Klaksvík um støðuna, nú tunnulin millum Leirvík og Klaksvík letur upp. Eg sat og hugdi at hesi køldu sending sum kulsandi stari á telefontráði. Hvat var meiningin við hesi sending? Tú sást forrætningsmann standa í durinum og hyggja við langtandi eygum eftir kundunum. Tú sást víðar kavafløtur fara um skíggjan, sum um hetta var í Sebir. Tá ið sendingin var liðug, sat eg eftir á tráðnum og krepti beinið upp undir meg: Kalt er í Klaksvík, og tað verður kaldari, tá ið tunnilin letur upp, tí tá verður so nógvur gjóstur.

Egnarin, hjá Archibald Black stendur so fattur á bryggjuni í mótljósi og hevur borið mangt og mikið á sínum herum. Listamenn um tann víða heim, hava mangan málað lutir og fólk í mótljósi. Heðin Kambsdal, listamaður úr Fuglafirði er meistari á hesum øki. Mótljósið spælir sær dagliga millum firðir og sund, serliga har fjøllini eru høg. Hetta hevur Heðin fest á lørifttið, eins og skaparin sjálvur ger tað, hóast flestu myndir hansara eru úr Fuglafirði, kundi hetta eisini verið í Klaksvík. Hesar myndir eru stak fjálgar.

Kalt? Nei, nei, nei, nei, nei! Mótljósið er fjálgt. Hóast tú kanska ikki altíð sær skapið, sum tað eigur at vera, so er skuggamyndin livandi. Glámlýsið er eitt slag av mótljósi, har alt deytt verður livandi, og tey livandi verða lívligari. Soleiðis er tað eisini í Klaksvík. Klaksvíkin hevur altíð verið ein livandi staður við fjøllbroytnum mentanarlívi. Hetta ber hin tigandi egnarin boð um. Stinnur og sterkur í mótljósi. Kring hann er øll Klaksvíkin. Hann er eitt endurskin av tí, ið havið gevur, sum allir føroyingar eru tengdir at. Úr hansara hondum kemur lívið. Hann er neistin, íbirtarin, hin fjálgi boðberin, sum stendur stillur og stinnur á bryggjuni í mótljósi og sigur frá einum dyggum skaldakendum drátti, sum er á hesum staði. Klaksvíkin er rík. Kór, Studiu Pegasus, Klaksvíkar hornorkestur, listafólk, Leikalund, Norðoyar dansifelag, Sjónleikarafelagið, KÍ, Stjørnan, flogbóltur, Norðoya Sparikassi, Alex Sólstein, Jógvan við Keldu, Dávur Winther, Steitór Rasmussen, Kular røtur, Frændur, popporkestur, skiparar, Kósin, línubátar, trolarar, útróðrarmenn, langfaratrolarar....... og ein egnari í mótljósi.

Tá ið tunnilin letur upp verður fjálgari í Klaksvík, og klaksvíkingar fara at menna seg uppaftur meir. Eg fari at heita á alt Føroya fólk um at fara til Klaksvíkar, tá ið tunnilin letur upp, at hyggja at tí fjálga egnarinum hjá Archibald. Hetta er eitt frábera gott, fjálgt listaverk. Øll Klaksvíkin er í hesari standmynd, sum verd er at skoða.... og hetta er ikki í Sebir!


## Starv í KT-deildini á Føroya Tele

"Kreativitetur krevur dirvi at sleppa øllum sannleikum"

- Erich Fromm



KT-deildin, sum er skipað sum partur av móðurfelagnum Føroya Tele, veitir KT-tænastur til feløgini í konsernini. Deildin heldur til í nýggja høvuðssætinum hjá Føroya Tele í Hoyvík. Umframt rakstur og viðlíkahald av KT-umhvørvinum, hevur deildin ábyrgdina av menningini av skipanum til m.a. kundarøkt og avrokning.

Áhaldandi menningin á bæði tøkniliga og handilsliga økinum setir stór krøv til felagið – og ikki minst til KT-deildina. KT-strategi og hartil knýtt virkismenning, verkætlanarleiðsla og tøknilig KT-menning eru týdningarmikil fyri at røkka strategisku málunum hjá konsernini. Umsøkjari má hava royndir innan eitt ella fleiri av hesum økjum.

Umsøkjari skal hava útbúgving frá hægri lærustovni, so sum verkfrøði, dátufrøði, cand.merc. ella líknandi, og verða sinnað/-ur at arbeiða í verkætlanum sum kunnu nema við øll øki í konsernini.

Løn og setanarviðurskifti verða eftir galdandi sáttmála við avvarðandi yrkisfelag ella eftir avtalu.

Nærri fæst at vita frá Michael Thomsen, mth@ft.fo, tel 243071 ella Starvsfólkadeildini á tel 303030.

Umsóknir við avritum av prógvum og ummælum skulu verða Føroya Tele í hendi í seinasta lagi 24. apríl 2006 og skulu stílast til:

**Føroya Tele**
Starvsfólkadeildin
Postsmoga 27
110 Tórshavn

Føroya Tele er størsti veitarin av samskiftistænastum í Føroyum. Felagið er skipað sum eitt móðurfelag og trý dótturfeløg. Samlaða starvsfólkatalið er 230, og í 2005 var samlaði umsetningurin kr. 307 mió.

FØROYA TELE
*Skapið framtíðina saman við okkum!*